# Tjaldrið setti trumf á



Dreingirnir á Tjaldrinum vunnu góðan og spennandi róður á ólavsøku

*Mynd: Jens K. Vang*

**NSÍ dreingirnir lótu ongan iva vera, tá teir gjørdu av, hvar skápið skuldi standa**

5–MANNAFØR DREINGIR

*Jóannes Hansen*

Teir vóru ikki meistarar, tá teir komu á ólavsøku. Men tað restaði bara eitt stig í. Tá fyrsti FM róðurin á ólavsøku var av, vóru teir meistarar, og tað so rudduliga. Heili átta stig vóru til avlops.

Kappingin millum dreingirnar var ógvuliga spennandi. Fleiri bátar skiftust um at snodda til fremsta plássið, men á málinum vóru teir báðir fremstu bátarnir teir somu, sum vóru fremstir í FM kappingini.

Munurin frá Tjaldrinum og aftur til Blik var ikki stórur. Fram við Molanum vóru hesir báðir partar í frágera góðari tvíkapping um ólavsøkusigurin. Bátarnir fóru stavn um stavn framvið Molanum. Tjaldrið fór fyrri undir endaspurtin, teir umborð á Bliki svaraðu aftur, men tað var ikki nóg mikið hjá argjadreingjum at endurtaka sigurin frá vestanstevnuni. Tjaldrið var eina lítla hálva bátslongd fyrst á mál, og áskoðararnir høvdu verið vitni til eina framúr spennandi kapping.

## Aftur uppií

Fípan Fagra hevði møguleika at vinna bronsuplássið í FM kappingini, men teir vóru akkurát ov stuttir. Sílið endaði eitt stig frammanfyri Fípuna Føgru, men á ólavsøku lógu klaksvíks dreingir á havnardreingjum.

Fípan Fagra tóktist upp undir endan á kappingarárinum rættuliga at hava fingið fatur í startinum. Eftir fyrsta startspurtin vóru teir skjótt skutin frammanfyri kappingarneytarnar. Inntil bátarnir komu á Molan, var Fípan Fagra fremst.

Fípu dreingirnir hava eftir fleiri av undanfarnu kappingunum gramt seg um, at miðróðurin hjá teimum hevur ikki verið nóg góður. Um tað ber til at tosa um miðróður á ólavsøku, so kunnu vit staðfesta, at tað enn eina ferð miseydnaðist hjá Fípuni Føgru at halda tørn, eftir at teir høvdu verið fremstir á fyrsta teininum.

Men tað vóru teir í gula bátinum, sum gjørdu bart. Tjaldrið endurvann FM heitið frá í fjør, og bæði við tí og sigrinum í ólavsøkuróðrinum verður teimum ynskt hjartaliga tillukku.

Argjadreingir umborð á Bliki megnaðu ikki í heimasjógvi at endurtaka sigurin frá vestanstevnuni. Teir eru blaðungir, og tí man lítil ivi vera um, at teir komandi ár fara at herja á aftur og fara at vera við í telvingini um fremstu plássini.

Tjaldurs dreingirnir verða teir fyrstu, sum fáa møguleikan at taka lut í róðrarkapping. Dreingjabátinum, sum vinnur FM heitið, stendur í boði at fara til Danmarkar í september at luttaka í kappróðri í Sorø.

# Argjagentur snýttu tær umborð á Fípuni Føgru

**Framúr góður startur hjá Bliki legði lunnar undir sera sannførandi sigur í heimasjógvi**

5–MANNAFØR GENTUR

*Jóannes Hansen*

Á Argjum høvdu tey gjørt seg til. Tey ætlaðu at tað skuldi síggjast og hoyrast, tá 5–mannafarið hjá teimum, Blikur, hevði vunnið á ólavsøku. Tey høvdu vónað, at tað skuldi gangast væl hjá gentunum, men tað var kanska størri sannlíki fyri, at tað skuldu verða dreingirnir, ið endurtóku sigurin, sum teir tvær vikur frammanundan høvdu ognað sær í Sørvági.

Dreingirnir vóru óførir, men tað eydnaðist teimum ikki at vinna, og tað var eitt vónbrot á Argjum.

Men so var tað, at genturnar av álvara gjørdu um seg og í stórum stíli vunnu ólavsøkuróðurin so sannførandi, sum eingin annar hevði gjørt undan og síðani.

Tá tær komu á málið, var Blikur meiri enn hálva aðru bátslongd frammanfyri FM vinnararnar umborð á Fípuni Føgru. Hesar noyddust at stríðast nógv fyri at vinna annað plássið, sum Tjaldrið – tað hevur annars ikki vignast so væl hjá teimum í ár – eisini var kandidatur til.

Uppskriftina til sannførandi avrikið hjá Blika gentunum góvu tær sjálvar okkum longu í fríggjadags blaðnum.

– Vit hugsa fyrst og fremst um at halda Sílið aftanfyri okkum, soleiðis at vit kunnu vinna FM silvur krónurnar. Um vit haraftrurat skulu hava nakran møguleika at gera nakað við Fípuna Føgru, so er tað neyðugt hjá okkum at fáa ein betri start, enn vit hava havt higartil. Vit hava roynt at leggja startin hjá um, og vit hava vant startin sera nógv síðani á vestanstevnu.

Hetta segði bátsformaðurin umborð á Bliki, Joan Mikkelsen, sum eisini ásannaði, at á vestanstevnu miseydnaðist starturin hjá teimum fullkomuliga.



*Genturnar á Fípuni Føgru vóru nr. 2 í seinasta róðrinum, men tær vóru tryggir meistarar*

*Mynd: Jens K. Vang*

Og tað var ikki eiti á, sum tað spurdist nógv burturúr hjá Bliki av nógvu venjingini á fasta startinum. Reyði báturin av Argjum var sum ein rakett undan Argjahøvda. Tað var beinanvegin, at tær høvdu vunnið seg ein skut framum næstu bátarnar, og tað tóktist at hava stóran týdning.

Á vestanstevnuni vunnu tær umborð á Fípuni Føgru í sama sannførandi stíli, sum tær høvdu vunnið á norðoyarstevnu. Tað fegnaðust tær um, tí í hinum trimum kappingunum hevði fjarstøðan frá Fípuni og aftur til næsta bátarnar ikki verið so stór.

## Útselt

At Blikur hevði so góðan start hesa ferð tóktist órógva tær umborð á Fípuni. Fyri fyrstu ferð í ár vóru tað ikki tær, sum vóru fremstar og harvið høvdu sinniliga yvirskotið, sum altíð ger tað lættari at stýra kappingini. Umborð á Fípuni Føgru vóru tær noyddar at leggja nógv fyri, og á Molanum høvdu tær vunnið seg stavn um stavn við Blik, og tað vóru ábendingar um, at tað fyri sættu ferð av seks møguligum skuldi eydnast Fípu gentunum at vinna.

Men øgiliga stríðið at koma undir liðina á Bliki hevði kostað. Argjagenturnar fóru fyrri undir endaspurtin, enn tær umborð á hinum bátunum, og tað var ikki eiti á endaspurtur. Meðan tað sá út til at vera útselt umborð á Fípuni Føgru, gleið Blikur spakuliga frá føroyameistarunum. Sinniliga yvirskotið umborð á Bliki vaks, og tað minkaði umborð á Fípuni Føgru.

Fyri manningina á Sílinum var tað sjálvsagt vónbrot, at tær ikki megnaðu at enda á heiðursmerkjaplássi í heimasjógvi og at vinna silvurmerkini í FM kappingini.

Spurningurin er so, hvussu tað verður komandi ár. Miðalaldurin umborð á Bliki er sera lágur, og tí kann tað roknast við, at tær av álvara fara at gera um seg. Hjá øllum uttan bátsformanninum er talan um fyrsta kappingarárið. Fyrstu kappingarnar í ár tykjast tær hava arbeitt við at koma á lagið. Nú hava tær funnið rætta lagið, og so er upplagt, at tær komandi ár fara at gera nyttu burturúr rætta lagnum – m. a. í kapping við FM vinnararnar úr Klaksvík.



# Kappingarneytarnir hjá Toda gera um seg



**Í hesi vikuni fer Todi Jónsson undir stríðið fyri at vinna sær pláss aftur í FCK álopinum**

ÚTISETAR

*Jóannes Hansen*

Tað gongur sum eftir ánni hjá FCK. Sunnudagin høvdu teir vitjan av Vejle, og tað var eingin ivi um, hvat var betra liðið í Parkini. FCK vann 4–1, og sigurin kundi havt verið væl størri.

FCK menninir misnýttu eina rúgvu av møguleikum. Zuma, sum skoraði eitt mál, og sum aftur hesa ferð stóð sterkur í myndini, hevði fleiri upplagdar møguleikar, og Heine Fernandez misnýtti eitt brotsspark.

Hesa ferð megnaði Fernandez fyri fyrstu ferð síðani hann í fjør kom til FCK at skora tvey mál í sama dysti. Síðsta FCK málið skoraði Carsten Fredgaard, sum fyri stuttum er komin úr Onglandi.

Todi Jónsson var ikki á FCK liðnum sunnudagin, og hann var heldur ikki á beinkinum. Í hesi vikuni er føroyski álopsmaðurin farin aftur at venja saman við liðfeløgunum. Todi verður ikki við, tá FCK í annaðkvøld fer at spæla á heimavølli í Europa Cup, og hann verður heldur ikki við í landskappingini í komandi viku. Stóri spurningurin er, um hann verður tøkur mikukvøldið í komandi viku.

Um tað í annaðkvøld fer at eydnast FCK at koma víðari í Europa Cup, skulu teir mikukvøldið í komandi viku spæla á heimavølli ímóti italska Lazio. Tað er ein dystur, sum Todi ógvuliga fegin hevði vilja spælt við í.

At Zuma, Fredgaard og Fernandez allir halda lív í málskjótingini ger tað ikki lættari hjá Toda at sleppa upp í part aftur.

## Brøndby ogAaB hanga í

Undan kappingarbyrjan í Danmark varð roknað við, at umframt FCK fóru Brøndby og AaB at kappast um oddasessin. Nú eru trý umfør farin aftur um, og tað eru júst hesi feløgini, sum hava fult stigatal.

Brøndby var í Gladsaxe, har teir stutt undan hvíldini komu á odda við brotssparki. Tá teir stutt eftir steðgin øktu, kundi tað sæð út til, at talan fór at verða um lættan sigur, men soleiðis gekk ikki. AB minkaði um munin, og so trýsti heimaliðið fyri at javna, men í staðin økti Brøndby eftir snarálop.

AaB var í Århus, har heimaliðið, AGF, í 1. hálvleiki var á odda 1–0, men so mistu teir ein mann, og AaB vann 3–1. Viborg og FCM spældu 1–1, og Lyngby vann á heimavølli 2–0 á Esbjerg. Gestirnir høvdu eina rúgvu av góðum málmøguleikum, men teir fingu ikki hol á.

# Úrslit og støður

### 5-mannafør dreingir

| | |
|---|---|
| 1.Tjaldrið | 4.32,18 |
| 2. Blikur | 4.33,23 |
| 3. Fípan Fagra | 4.39,21 |
| 4. Sílið | |
| 5. Frúgvin | |
| 6. Havfrúgvin | |
| 7. Drekin | |
| 8. Beinta | |
| 9. Erla Kongsdóttir | |

### Endaliga støðan

| | | |
|---|---|---|
| 1. Tjaldrið | | 38 |
| 2. Blikur | | 29 |
| 3. Sílið | | 21 |
| 4. Fípan Fagra | | 16 |
| 5. Frúgvin | 1G | 15 |
| 6. Havfrúgvin | | 9 |
| 7. Drekin | | 0 |
| 8. Beinta | | 0 |
| 9. Erla Kongsdóttir | | 0 |
| 10. Frivaldur | | 0 |

### 5-mannafør gentur

| | |
|---|---|
| 1. Blikur | 4.53,15 |
| 2. Fípan Fagra | 4.58,23 |
| 3. Tjaldrið | 5.00,16 |
| 4. Sílið | |
| 5. Drekin | |
| 6. Ørnin | |
| 7. Hvassi | |
| 8. Havfrúgvin | |
| 9. Frúgvin | |
| 10. Firvaldur | |
| 11. Beinta | |
| 12. Dúgvan | |
| 13. Báran | |
| 14. Snípan | |

### Endaliga støðan

| | |
|---|---|
| 1. Fípan Fagra | 40 |
| 2. Blikur | 29 |
| 3. Sílið | 26 |
| 4. Tjaldrið | 16 |
| 5. Ørnin | 9 |
| 6. Drekin | 4 |
| 7. Hvassi | 4 |
| 8. Havfrúgvin | 4 |
| 9. Frúgvin | 2 |
| 10. Firvaldur | 0 |
| 11. Beinta | 0 |
| 12. Dúgvan | 0 |
| 13. Snípan | 0 |
| 14. Báran | 0 |

### 6-mannafør kvinnur

| | |
|---|---|
| 1. Páll Fangi | 4.46,02 |
| 2. Sølmundur | 4.47,21 |
| 3. Gongurólvur | 4.51,20 |
| 4. Jarnbardur | |
| 5. Leirvíkingur | |
| 6. Víkingur | |
| 7. Fortuna | |
| 8. Hvessingur | |
| 9. Snopprikkur | |
| Lómur | |

### Endaliga støðan

| | |
|---|---|
| 1.Páll Fangi | 42 |
| 2. Jarnbardur | 25 |
| 3. Sølmundur | 23 |
| 4. Gongurólvur | 15 |
| 5. Víkingur | 10 |
| 6. Leirvíkingur | 8 |
| 7. Hvessingur | 3 |
| 8. Fortuna | 1 |
| 9. Lómur | 0 |
| 10. Snopprikkur | 0 |

### 6-mannafør menn

| | |
|---|---|
| 1. Strálan | 4.28,15 |
| 2. Páll Fangi | 4.30,01 |
| 3. Sølmundur | 4.30,06 |
| 4. Riddarin | |
| 5. Hvessingur | |
| 6. Gongurólvur | |
| 7. Fortuna | |
| 8. Kollfirðingur | |
| 9. Fuglfirðingur | |
| 10. Snopprikkur | |
| 11. Lómur | |

### Endaliga støðan

| | | |
|---|---|---|
| 1. Strálan | 2G | 37 |
| 2. Sølmundur | | 32 |
| 3. Riddarin | | 23 |
| 4. Hvessingur | 1G | 16 |
| 5. Páll Fangi | | 14 |
| 6. Snopprikkur | 1G | 4 |
| 7. Gongurólvur | | 4 |
| 8. Fortuna | | 2 |
| 9. Fuglfirðingur | | 0 |
| 10. Kollfirðingur | | 0 |
| 11. Lómur | 1G | 0 |
| 12. Hósvíkingur | | 0 |
| 13. Víkingur | | 0 |

### 8-mannafør

| | |
|---|---|
| 1. Nevið Reyða | 4.17,12 |
| 2. Knørrur | 4.18,13 |
| 3. Kvívíkingur | 4.20,24 |
| 4. Argjabáturin | |
| 5. Heiðabáturin | |
| 6. Ørvur | |

### Endaliga støðan

| | | |
|---|---|---|
| 1. Nevið Reyða | | 40 |
| 2. Kvívíkingur | 1G | 28 |
| 3. Knørrur | | 27 |
| 4. Argjabáturin | 1G | 19 |
| 5. Ørvur | 1G | 8 |
| 6. Heiðabáturin | | 6 |
| 7. Ormurin langi | | 4 |

### 10-mannafør

| | |
|---|---|
| 1. Havnarbáturin | 3.52,03 |
| 2. Vestmenningur | 3.53,22 |
| 3. Eysturoyingur | 3.55,04 |
| 4. Nólsoyingur | 3.58,10 |
| 5. Skálabáturin | 4.02,01 |

### Endaliga støðan

| | | |
|---|---|---|
| 1. Havnarbáturin | 1G | 42 |
| 2. Vestmenningur | | 28 |
| 3. Eysturoyingur | 1G | 25 |
| 4. Nólsoyingur | | 18 |
| 5. Skálabáturin | 1G | 13 |
| 6. Suðuroyingur | | 11 |
| 7. Vágbingur | | 0 |